# Hava slept sparingum sum raka tey sjúku børnini

**Eftir øllum at døma hjálpti tað at mótmæla tí leiðslan á Landssjúkrahúsini hevur nú tikið aftur boðini um at barnadeildin á Landssjúkrahúsinum skal steingjast í vikuskiftinunum**



*Illa dámdar sparingar á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum eru nú tiknaraftur. Tað er ein stórur fyrimunur fyri barnasjúkraröktina og ein stór trygd hjá sjúkum børnum og foreldur, sum teirra, sigur Joan Olsen á barnadeildini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ OG SPARINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein partur av teimum illa dámdu sparingarnar á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum eru nú sleptar.

Tað varð greitt, tá ið tey gjørdu klárt at fara í vikuskifti.

Sostatt tykist tað, sum um tey nógvu mótmælini ímóti ætlaðu sparingunum á barnadeildini, hava fingið leiðsluna á Landssjúkrahúsinum at umhugsa støðuna av nýggjum og at broyta avgerðina.

Sparingarnar høvdu rakt barnadeildin serliga meint, tí meiningin var, at hon skuldi steingja hvørt vikuskifti sum til bar, tað sum er eftir í árinum.

Ístaðin skuldu børnini, sum vóru innløgd, flytast á aðrar deildir, og móttøkan skuldi samsskipast við bráðfeingis deildini í nýggja G-bygninginum.

Har eru umstøðurnar ikki eru gjørdar til serliga tørvin, sum børn hava, tí har eru ikki tær barnavinarligu umstøðurnar, sum eru á barnadeildini, við spælistovu og leikum og har roynt verður at gera umstøðurnar so heimligar sum gjørligt. Og har eru heldur ikki starvsfólkini á barnadeildini, sum hava áralangar royndir í at nettupp at eygleiða børn og annars at vera um sjúk børn og teirra foreldur við tí serliga tørvi tey hava.

Í G-bygninginum eru eisini ógvuliga avmarkaðir møguleikar at lata foreldur liggja inni við børnunum.

Men meinast hevði hetta kanska rakt tey børn, sum hava opnan innleggingarseðil. Tað merkir, at tey hava sjúku ella brek, sum ger, at tey hava havafyri neyðini at koma beinleiðis á barnadeildina, uttanum vanligu skipanina.

Her er talan um fjølbrekað børn og um børn við serligum sjúkum, sum ger, tað er neyðugt hjá teimum at koma á barnadeildina við stuttum skotbrái.

– So samanumtikið hevði tað verið eitt afturstig fyri barnasjúkraröktina, at stongt barnadeildina í vikuskiftunum, sigur Joan Olsen, álitisfólk á barnadeildini

– Í G- bygninginum er bara eitt rúm við plássi til fleiri sengur. men børn eru í ymsum aldri og tey hava ymsar sjúkur og tað tað er ikki altíð hóskandi at hava tey á eini blandaðari stovu.

### Opin sum vanligt

Sparingarnar skuldi setast í verk fyri at spara pening so at Landssjúkrahúsið kann halda játtanina.

Eftir ætlan skuldu ætlaðu sparitiltøkini á Landssjúkrahúsinum setast í verk frá 1. september at rokna, tað var hósdagin og vikuskiftið, sum júst er farið afturum, skuldi vera tað fyrsta, har barnadeildin varð stongd.

Men Barnadeildin varð ikki stongd og har gekk arbeiðið sum vant.

Orsøkin til tað er, at leiðslan hevur givið deildini boð um, at fyribils verður hesin parturin av sparitiltakinum sleptur.

Fyribils verður barnadeildin sostatt altíð opin sum vant.

Ìstaðin fyri hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum tikið undir við einum uppskoti frá starvsfólkinum á deildini um at seta aðrar sparingar í verk.

Tað verður gjørt við at umleggja vaktir.

Úrslitið er sostatt, at hereftir verður bara ein sjúkrasystir á vakt um kvøldarnar og um næturnar í vikuskiftunum. Tó skal ein onnur hava tilkallivakt, so at tað altíð skal bera til at fáa tvær sjúkrasystrar á deildina, verður tað neyðugt og nógv er at gera.

Annars hevur skipanin verið, at tvær sjúkrasystrar á vakt um kvøldið og um næturnar.

– Vísir tað seg, at hesar umleggingarnar spara Landssjúkrahúsinum pening, verður hetta støðan alt árið. Vísir tað seg ikki, at nakað verður spart, verður støðan viðgjørt av nýggjum, tí vit hava fingið greið boð um, at sparingar skulu finnast, sigur álitisfólkið.

Á Landssjúkrahúsinum verður sagt, at hetta er ein stórur lætti, tí tað hevði verið eitt afturstig í tænastuni at latið barnadeildina aftur um vikuskifti.

– Serliga hevði tað verið eitt afturstig fyri tey børn, sum hava opnan innleggingarseðil og tey eru nokk so nógv í tali. Og so eru tað sjálvsagt tey, sum verða innløgd akutt, heldur Joan Olsen.

– Hetta er ein stór trygd hjá sjúkum børnum og teirra foreldrum, leggur hon afturat.

## Sólborg útleigað í næstum

Allir menninir á rækjutrolarunum Sólborg eru farnir í land, og reiðarin væntar, at skipið verður leigað út í vikuni. Petur H. Jacobsen, reiðari, sigur, at tað gongur eftir ætlan við at leiga skipið út, og hann væntar, at alt kemur upp á pláss í komandi viku.

Nakrar ábøtur skulu gerast á skipið, m. a. skal okkurt gerast á verksmiðjuni, og harafturat skal skipið klassast, áðrenn tað fer avstað. Í løtuni bíðar reiðaríið eftir tilboðum frá einari føroyskari og tveimum donskum skipasmiðum upp á hesi arbeiði.

Petur H. Jacobsen sigur, at væntandi verður Sólborg leigað út frá 1. oktober at rokna, men hann vil ikki siga, hvør tað er, ið ætlar sær at leiga rækjutrolaran.

**tn**



*Alt bendir á, at rækjutrolarin Sólborg verður leigaður av landinum.*

*Mynd: Skipalistin 2005*

### Friðarligt vikuskifti

Hóast nógv fólk hevur verið í býnum í vikuskiftinum, so hevur tað verið stak friðarligt kring landið. Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at løgreglan tvær ferðir hevur verið kallað út til bústaðir, har fólk í veitslulag hava hildið í so nógvan gang, og tað er beinan vegin komið í rættlag.

Tíðliga sunnumorgunin bleiv ein ungur maður tikin á støðini, har hann slapp at sova rúsin av sær.

Annars hevur einki stórvegis verið av hvørki herverki ella harðskapi, sigur vakthavandi

**tn**

### Ein tikin fyri rúsdrekkakoyring

Tíðliga leygarmorgunin steðgaði løgreglan einum bili í Vágatunnlinum. Illgruni var um, at bilførarin var ávirkaður, og førarin noyddist at blása í ballónina. Maðurin bleiv síðani tikin við á politistøðina, har lækni tók blóðroynd av honum. Hann verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

**tn**

## Bilar standa ólógliga til sølu

Tað er ikki óvanligt, at vit síggja bilar standa til sølu fram við alfaravegi kring alt landið. Hetta er tó ikki lógligt, og løgreglan er farin undir eina roynd at steðga hesum.

Eitt av teimum støðum, har flest privatir bilar standa til sølu, er á økinum uttan fyri Skógrøkt Landsins við Hvítanesvegin. Leygardagin var løgreglan á staðnum, og í sambandi við hetta kunnu fimm bilaeigarar vænta sær bót. At átakið við at steðga hesum ger mun, hava fólk, ið dagliga ferðast eftir Hvítanesvegnum eisini lagt til merkis, tí nú standa væl færri bilar á økinum.



*Síðani løgreglan gjørdi eitt átak móti bilunum, ið standa til sølu við Hvítanesvegin, eru bilarnir minkaðir nógv í tali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**tn**